## Kristian Blak um Angeliku:

- Angelika hevur spælt saman við okkum, síðan hon var barn. Eg varð beinanvegin greiður yvir, at hon hevði serligar gávur. Hon seyg til sín frá teimum tónleikarum, ið hon spældi saman við. Angelika fatar nýggjan tónleik beinanvegin og so skjótt, sum hon hevur hoyrt eitt lag dugur hon at spæla tað. Hetta er ein stórur fyrimunur, tá tú spælir fólkatónleik, har tað í stóran mun snýr seg um at lurta. Samstundis hevur hon førleikan sum ein konservatorii tónleikari. Hon er altíð konsentrera øgiliga um sítt ljóðføri, og tí kann hon uttan trupulleikar skifta millum eitt nú klassiskt og fólkatónlei, jass ella rokk.



*Kristian Blak og Angelika hava spælt saman í spælimonnunum í nógv ár, og eru nú saman í bólkinum Kvonn.*

# At siga tað, ið ikki kann

**Á violinini sleppur Angelika at siga tað, ið ikki kann sigast av mannamunni. Um hon ikki spælir tónleik ein dag, so er tað okkurt, sum manglar greiðir unga kvinnan úr Vestmanna frá**



## Samrøða

**Fróði Stenberg**
post@sosialurin.fo

- Eg veit ikki, hví tónleikur fyllir so nógv í mínum lívið, men um eg ikki spæli tónleik í ein dag, er tað sum um okkurt manglar". Soleiðis tekur Angelika Nielsen til, tá spurt verður um hvønn týdning tónleikur hevur fyri hana. Violinin er amboð hjá Angeliku, at siga tað, ið ikki kann sigast av mannamunni

### Hvonn blívur til Kvonn

Fyri stuttum kom Angelika upp til Føroya at vitja familju sína um jóla hátíðuna, áðrenn hon so fór niður aftur til Keypmannahavnar, har hon lesur á Kongaliga danska tónleikakonservatorium.

- Eg havi havt nokk av nýggjum tilfari at læra og venja, sigur hon brosandi. Sipað verður til nógvu venjingarnar í sambandi við konsertir við Symfoniorkestrinum og egnum bólki. Angelika luttók á Nýggjárskonsertini hjá Symfoniorkestrinum, umframt at hon spældi við egnum bólki, Angelika, í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Konsertin í Miðlahúsinum bleiv sera væl móttikin av áhoyrarunum.

Síðan konsertina í Miðlahúsinum hevur bólkurin Angelika skift navn og eitur nú Kvonn.

- Upprunaliga navnið á bólkinum var Hvonn, men so funnu vit útav, at tað var nýggja navnið á fyrrverandi Sjómansheiminum. So brúktu vit bara Angelika fyribils, inntil skiftið til Kvonn bleiv gjørt, sigur 23 ára gamla gentan.

### Valið fall á violinina

Angelika er uppvaksin í Vestmanna í einum húsi, ið var sermerkt við ríkum áhuga fyri tónleiki. Líka síðan hon var barn, hevur hon havt ymisk ljóðføri rundan um seg, og so smátt byrjaði Angelika at royna seg við teimum. Serliga var tað violinin, ið bleiv nógv spæld uppá, samstundis sum mamma hennara hjálpti henni við at læra seg at lesa nótar.

- Tað var ikki tað heilt stóra at gera í Vestmanna tá. Ítróttur hevur aldrin havt mín stóra áhuga, so eg vitjaði mínar vinkonur, málaði ella var heima í kjallaranum, tá eg ikki spældi upp á violinina".

### Skúlagongd

Aftaná 9. flokk í fólkaskúlanum, fekk Angelika møguleikan at útbúgva seg til violinlærara í Íslandi. - Eg haldi tað var í Ìslandi, at eg fann útav, at tónleikur skuldi blíva mítt lívsyrki, sigur Angelika.

Hetta endaði við einum tíðarskeiði upp á fýra ár við nógvari venjing og teori sum gerandiskosti.

Nýggjar avbjóðingar bíðaðu eftir henni í Malmø í Svøríki, har hon gekk tvey ár í skúla, eftir hon var liðug í Íslandi. Verkætlanir hava síðan verið

Sosialurin